# ítróttur

Nr. 185 • hósdagur • 29. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


Fernando Alonso:

# Fyrsti spanski heimsmeistarin í formel 1

**Spania hevur fingið formel 1 fepur, fyrstu ferð nakrantíð kunnu spaniumenn kalla seg heimsmeistarar í formel 1, og hetta hevur vakt áhugan í Spania fyri rasarakoyring**


HEIMSMEISTARI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*





*Fernando Alonso hevur altíð kappast ímóti koyrarum, sum eru eldri enn hann, og tí er tað nokkso hóskandi, at júst hann gjørdist yngsti heimsmeistari í formel 1 nakrantíð*

*Mynd: Reuters*

Umframt at vera yngsti heimsmeistari í formel 1 nakrantíð, er Fernando Alonso eisini fyrsti spanski heimsmeistari í formel 1. Hann er somuleiðis einasti spaniumaður, ið hevur vunnið eina formel 1 koyring. Í mun til flestu evropeisku londini hevur Spania ongantíð luttikið serliga aktivt í formel 1. Einans 10 spanskir koyrarar hava luttikið í formel 1 koyringum, og hesir hava samanlagt vunnið 256 stig, av hesum hevur Fernando Alonso vunnið tey 231. Hetta hevur veruliga vakt áhugan fyri formel 1 í Spania.

Fernando Alonso segði á tíðindafundinum aftan á heimsmeistaraheitið var komið í hús, at eftirsum Spania ikki var eitt land við eini formel 1 søgu, so var sera trupult at fáa nakran stuðul í sínum royndum at gerast formel 1 koyrari. Tí var allur vegurin til formel 1, úrslit av hørðum arbeiði, og við hjálp frá nøkrum heilt fáum fólkum, ja tey kundu teljast á einari hond.

## Arvaði Go-kart

Ovast á takkarlistanum stendur pápin José Luis Alonso. José droymdi sum ungur um at gerast rasarakoyrari, men umstøðurnar loyvdu hesum ongantíð. Hann royndi tí ístaðin, at vekja áhugan hjá síni 8 ára gomlu dóttur Lorenu og bygdi henni ein go-kart. Men henni dámdi einki at koyra hart, og lítlibeiggin, tann tá trý ára gamli Fernando, arvaði bilin. Pápin tillagaði pedalirnar, soleiðis at hann rakk niður til tær. Longu sum fimm ára gamal smurdi Fernando javnaldrandi kappingarneytarnar av, og pápin sá, at her var talan um veruligar gávir.

Næstan hvørt vikuskiftið vóru Fernando og pápin á ferð til Go-kart kappingar. Hetta var strævið og kostnaðarmikið hjá familjuni, men tey stuðlaðu honum øll, sigur Fernando Alonso á heimasíðu síni. Inntil hann var tólv ára gamal var pápin mekanikari. Men hægri upp í Fernando kom í kappingunum, jú dýrari og strævnari gjørdist ítrótturin. Tí royndu teir alsamt at fáa vinnulívið at stuðla honum, men eingin var áhugaður.

## Ov dýrt at luttaka

Familjan hevði ikki ráð at gjalda fyri útreiðslurnar at koyra í almenna spanska meistaraheitinum. Tí koyrdi Fernando í minni kappingum. Hann var altíð yngri enn kappingarneytarnir. Tá hann flutti enn ein aldursbólk upp til 100cc flokkin, máttu tey søkja um undantaksloyvi. Tí Fernando var so ungur.

Hann var so sannførandi í 100cc flokkinum, at eigarin av stóra go-kartfelagnum Genikart, Genis Marco gav honum møguleika at royndarkoyra fyri liðið. Royndarkoyringin var luttøka í eini kappkoyring í katalanska meistaraheitinum. Fernando sigur, at hann var greiður yvir, at hetta var stóri møguleikin, ið kundi tryggja hansara framtíð sum rasarakoyrari. Tí var trýstið nógv, men Fernando vann sannførandi. Hetta sama árið, vann hann spanska meistaraheitið fyri Genikart.

Alonso koyrdi fyri Genikart inntil 1996, tá hann skrivaði sáttmála við risastóra italska go-kart felagið IAME, hann var tá 14 ára gamal. Hetta sama ár gjørdist hann heimsmeistari í Go-kart.

## Vann á Spa

Eftir hetta gekk leiðin gjøgnum sponsku formula Nissan kappingina, har hann gjørdist meistari fyrsta árið, og síðan beinleiðis til Formel 3000. Hann gjørdist nummar fýra í formel 3000 í 2000, og vann koyringina á Spa. Flavio Briatore stjóri í Renault liðnum, sá gávuríka unga mannin vinna, og skundaði sær at gera sáttmála sum umboðsmaður fyri hann. Briatore setti unga spaniumannin í læru í Minardi liðnum kappingarárið í 2001. Her lærdi hann at koyra í formel 1. Hóast Minardi bilurin slettis ikki var kappingarførur, so var tíðin sambært Alonso sera lærurík.

Í 2002 var Alonso royndarkoyrari hjá Renault, og lærdi her nógv um Renault bilin og um liðið. Í 2003 fekk hann seturi hjá Jenson Button í Renault liðnum, og sum kappingarárið leið, bjóðaði Alonso alt meira royndara liðfelaganum Jarno Trulli av. Í Ungarn fekk Fernando fyrstu byrjunarstøðu og kom eisini fyrstur á mál. Við hesum sigrið gjørdist hann yngsti vinnari av eini formel 1 koyring nakrantíð.

## Bukaði Villeneuve

Tá Trulli var koyrdur úr liðnum, áðrenn kappingarárið 2004 var av, varð avloysarin fyrrverandi heimsmeistarin Jaques Villeneuve. Villeneuve bleiv avsmurdur av Fernando, og tað gjørdist alsamt týðiligari, at her var talan um ein sera gávuríkan ungan koyrara.

Hetta kappingarárið byrjaði væl fyri Renault. Liðfelagin Giancarlo Fisichella vann fyrstu koyringina í Avstralia, Alonso var 6,7 sekund aftan fyri á triðja plássi.Tað var greitt, at Renault hevði ein frálíkan bil. Við sigrum í formel 1 koyringunum á Sepang, Bahrain, Immola, Nurburgring, Magny Cours og Hockenheim, varð grundin løgd fyri heimsmeistaraheitinum. Men tað er í líka stóran mun, tær tryggu og skipaðu koyringirnar í seinnu helvt av kappingarárinum, har Fernando ferð eftir ferð tryggjaði sær virðismikil stig, sum vístu, at her er talan um ein koyrara, sum umframt at vera skjótur í einum bili, er førur fyri at hugsa. Tað er hesi evnið, ið hava gjørt Alonso heimsmeistara 24 ára gamlan.

*Keldur: www.fernandoalonso.com, www.forix.com; www.f1.com*

## FERNANDO ALONSO

**Føddur:** 21. juli 1981 í Oviedo í Spania
**Formel 1 koyringar:** 66 í árunum 2001-2005
Sigrar í formel 1: 7
**Á sigurskammlinum:** 21
**Byrjanir í fyrstu støðu:** 8
**Kilometrar koyrdir í formel 1:** 17.015
**Kilometrar á odda í formel 1:** 2.108
**Fyrsti sigur í almennari kapping:** Go-kart Pola de Laviana í 1988